

*Leygarmorgunin klokkan 11 undirskrivaðu Hans Enoksen og Jóannes Eidesgaard avtalu millum Føroyar og Grønland um vinnumenning, útbúgvingarmøguleikar og mentan, umframt samstarv á fiskivinnuøkinum. Undirskrivingin fór fram í býráðshølinum á Tvøroyri*

*Mynd: Dagfinn Olsen*

# Grønland verri avtalu enn Føroyar

**Grønland stríðist við at fáa avtalu við danir um undirgrundina, og vilja hava somu loysn sum føroyingar. Í dag eru 15 ár síðani, at føroyingar og danir skrivaðu undir sáttmálan um føroysku undirgrundina og løgmaður hevur lovað grønlendingum stuðul í undirgrundarmálinum**

UNDIRGRUND
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Hans Enoksen og fylgi hava verið á vitjan í Føroyum um vikuskiftið. Eitt av málunum, ið kom á breddan, tá løgmaður og grønlendski landsstýrisformaðurin samskiftu, var stríðið hjá grønlendingum at vinna sær rættindi í undirgrundarmálinum og samráðingarnar við danir í hesum sambandi.

Hans Enoksen nevndi sjálvstýrisnevndina, ið hevur arbeitt við at finna nýggja skipan í viðurskiftunum millum Grønland og Danmark.

- Knúturin tykist vera undirgrundin, sigur Jóannes Eidesgaard, løgmaður.

Grønlendingar vilja fegnir hava loysn, sum er lík føroysku avtaluni við danir.

- Teir hildu seg hava funnið eina semju, men so bar ikki til hóast alt, sigur løgmaður, og minnir á, at føroyingar á sinni fingu grønlendsku loysnina í boði, men mettu hetta at vera ov lítið.

Hendan avtalan hevur við sær, at tað, ið vunnið verður úr undirgrundini, verður býtt helvt um helvt millum partarnar.

- Føroyingar og grønlendingar eiga sjálvsagt at sleppa at nýta náttúrliga tilfeingið, og eg vóni, at grønlendingar halda fast í at velja føroysku loysnina, sigur løgmaður Jóannes Eidesgaard.

- Eg dugi ikki at skilja, at Danmark kann liva við, at Grønland nú 15 ár seinni fær eina avtalu, sum er verri enn tann føroyska, sigur løgmaður.

## Føroyska loysn 15 ár

- Undirgrundarmálið og føroyska avtalan er skúladømi um, at politiskt treiskni skal til. Tað eru 32 ár síðani, at føroysingar settu hol á samráðingarnar og samráðingarnar vardu í 17 ár. Í dag eru 15 ár síðani undirskrivingin fór fram og avtalan kom undir land, sigur løgmaður, og leggur afturat, at hetta er dømi um, at tað loysir seg at stríðast og ikki velja løttu loysninar.

Avtalan er 15 ár í dag og tá undirskrivingin fór fram, var hetta eisini á 60 ára degnum hjá Atla Dam, sum tá var løgmaður, og sum stóð á odda í samráðingunum við danir. Atli Dam, sáli, hevði sostatt verið 75 ár í dag og løgmaður hugleiðir:

- Atli Dam var markantur politikari og undirgrundarmálið stendur sterkt á hansara politisku leið. Tað er vert at minnast, at Atli mest samráddist við sínar paratamenn, so at siga, tí Anker Jørgensen sat við róðrið í Danmark, men Atli fekk als ongar sersømdir, og tað gjørdist ein konservativur forsætisráðharri, sum tók endaligu avgerðina, so føroyingar fingu undirgrundarrættindi, sigur løgmaður.

-Undirgrundarmálið stendur óivað eftir sum eitt lívsverk hjá Atla Dam, og hetta var eisini eitt satt bragd, og hetta er eisini eitt mál av sera stórum týdningi, sigur Jóannes Eidesgaars, løgmaður.

## Stuðlar grønlendingum

Men hvar stendur løgmaður, nú grønlendingar stríðast fyri sínum rættinum til undirgrundina?

- Óivað er ríkidømi í undirgrundini, so hetta er mál av stórum týdningi. Tað eru í dag 15 ár síðani, at føroyingar skrivaðu undir, og enn rennur ongin olja. Hetta er langtíðar politikkur og tað hevur týdning at hava fokus og minnast, hvat málið snýr seg um. Eg segði við Hans Enoksen á vitjan hansara her, at spyr hann meg til ráðs, so sigi eg, at grønlendingar mugu halda fast, tí hetta er stórmál, ið er av stórum týdningi, sigur løgmaður Jóannes Eidesgaard.

# Føroysk grønlendsk avtala

**Leygarmorgunin undirskrivaðu løgmaður Jóannes Eidesgaard, og grønlendski landsstýrisformaðurin Hans Enoksen, avtalu millum Føroyar og Grønland um vinnumenning, útbúgvingarmøguleikar og mentan, umframt samstarv á fiskivinnuøkinum. Hetta fór fram á Tvøroyri**

AVTALA
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Almenna vitjanin hjá Hans Enoksen, frú Aaliiaraq Enoksen og fylgi, varð nógv seinkað orsakað av seinkingum í flogferðsluni. Tey komu tó til Føroya í fríggjakvøldið. Ætlandi skuldi løgmaður vera vertur við døgurða í Nadodda neystinum á Tvøroyri í fríggjakvøldið, men hetta varð av ongum. Fylgið kom til Tvøroyar við Brimli á nátt , og restin av vitjanini gekk eftir ætlan.

Leygarmorgunin klokkan 11 undirskrivaðu Hans Enoksen og Jóannes Eidesgaard avtalu millum Føroyar og Grønland um vinnumenning, útbúgvingarmøguleikar og mentan, umframt samstarv á fiskivinnuøkinum. Undirskrivingin fór fram í býráðshølinum á Tvøroyri.

Hans Enoksen sigur í viðmerking, at í Grønlandi vænta tey sær nógv av samstarvinum við Føroyingar. Tað eru mangt, ið londini bæði kunnu læra hvør av øðrum, millum annað kunnu grønlendingar læra nógv av føroyingum, tá umræður útbúgving, tí har eru føroyingar frammanfyri grønlendingar.

Hans Enoksen metir, at søguliga sambandið millum londini bæði hevur sera nógv at siga, og at tað er ein styrki, at londini bæði líkjast og eru ymisk á mentanarøkinum.

Fylgið fór eftir undirskrivingina suður eftir oyggj til Vágs, har vitjan hjá Sirri var á skránni, og Vágs Býráð var síðani vertur við morgunmatarborð á Hotel Bakkanum.

Síðani var siglitúrur á skránni. Leygarkvøldið var Tvøroyrar Býráð vertur við ein døgurða. Fylgið gisti umborð á Smyrli í og fór við Smyrli til Havnar sunnumorgunin, har vitjað varð í Grønlendingahúsinum og farið varð í kirkju í Vesturkirkjuni. Seinnapartin sunnudagin fóru grønlendsku gestirnir av landinum aftur.

## Løgmaður fegnast

Løgmaður Jóannes Eidesgaard fegnast um, at samstarvið við Grønland nú er formaliserað. Hann vónar, at við hesum kemur meira ferð á og at samstarvið verður økt.

- Føroyingar og grønlendingar kunnu nú vinna frítt hvør hjá øðrum, fegnast løgmaður um, og nevnir, at hetta er ein gomul og søgulig siðvenja, sum nú er formaliserað.

Jóannes Eidesgaard fegnast um sáttmálan.

- Hetta er ein sáttmáli, sum fevnir um fleiri øki, og innan gransking og útbúgving kunnu føroyingar t.d. bjóða seg fram innan fiskivinnuútbúgving og maritimu útbúgvingar yvirhøvur, sigur løgmaður, og metir, at føroyingar eisini kunnu læra av og samstarva við grønlendingar á mongum økjum.

- Eg vóni, at alt Útnorðurøkið einaferð kann samstarva um hesi málini, sigur Løgmaður, og nevnir íslandssáttmálan.

- Tað er mín vón, at sáttmálin á ein hátt kann gerast eitt jarnbrot, so at Grønland kann koma við í samstarvið, sum Føroyar og Ísland hava, sigur løgmaður.

- Hetta er ein skilagóður sáttmáli, metir løgmaður.